# Útflutningurin nú størri enn innflutningurin

**Nýggjastu hagtølini frá Hagstovuni vísa, at bæði inn- og utflutningurin veksur, men útflutningurin veksur meira enn innflutningurin.**

Leo Poulsen

Yvirlit, sum Hagstovan hevur gjørt fyri inn- og útflutning januar til november 2010 vísir, at innflutningurin er vaksin við 82 milliónum krónum, úr 3.959 milliónum upp í 4.040 milliónir krónur fyrstu 11 mánaðarnar í fjør.

Tað er serliga virðið á brennievni, sum er økt munandi, úr 608 milliónum krónum upp í 890 milliónir krónur, sum er ein øking á 46%.

Ein annar bólkur, sum er vaksin munandi, er rávøra til fiskavirking, sum er farin úr 93 milliónum upp í 149 milliónir, og tað svarar til 59%. Og so er bilainnflutningurin eisini vaksin munandi, úr 88 milliónum upp í 119 milliónir krónur. Tað svarar til 32% vøkstur.

## Samlaði innflutningurin er vaksin 2%

Útflutningurin er í sama tíðarskeiði vaksin við 9%, úr 3.795 upp í 4.123 milliónir krónur. Hetta merkir, at útflutningsvirðið nú er størri enn innflutningurin.

Størsti vøksturin í útflutninginum er at vinna í bólkinum uppisjóvarfiskur, har virðið er vaksið úr 426 milliónum upp í 668 milliónir krónur, svarandi til 57%. Eisini virðið á botnfiski er økt, úr 1.168 upp í 1.336 milliónir krónur, tað er 14%.

Bólkurin Annar fiskur og fiskaúrdráttir er vaksin úr 240 upp í 263 milliónir krónur, sum svarar til 10%.

Virðið á útflutta alifiskinum er minkað við 3%, men nøgdin av útfluttum alifiski er heili 28% minni, og tað merkir ein munandi prísvøkstur á alifiski.

Tað skrivar Hagstova Føroya á heimasíðu sínari.



*Hóast nøgdin av laksi, sum er útflutt januar til november 2010 er heili 28% minni enn sama tíðarskeið í 2009, er útflutningsvirðið bert trý prosent minni*



*Bara fýra klivar eru tøkir nú*

# Arrestin má flyta

**Í verandi støðu er bara rúm fyri fýra fangum, og tað er ov lítið. Arrestin hevur funnið nøkur møgulig hús at leiga, men ovasta leiðslan í Danmark skal góðkenna leigumálið**

Randi Jacobsen

Eftir at blámusoppur varð staðfestur á politistøðini í Havn og í varðhaldinum, sum er bygt fast í politistøðina, var greitt, at bæði politi og varðhald vórðu noydd at finna sær onnur høli at vera, meðan soppafongdu hølini verða umvæld.

Bent Jákup Hansen, leiðari í arresthúsinum ótolnast eftri svari frá ovastu leiðsluni, sum skal góðkenna eitt leigumál. Arrestin hevur funnið nøkur hús, sum eru egnað.

Sjálvt um góðkenningin kemur frysta dagin, ganga kortini fleiri vikur, til arrestin kann flyta. Neyðugt verður við umbygging, og standa húsini í bygdum øki, verður helst neyðugt við grannahoyring.

Alt arresthúsið er ikki fongt við soppi. Fýra klivar kunnu framvegis brúkast. Tá ið teir eru so fáir, eru allar innsetingar útsettar langa tíð fram. Bara tey, sum verða tikin og varðhaldfongslað, sita nú.

– Starvsfólkini sita framvegis í soppafongdum hølum, sigur Bent Jákup Hansen.


LÆRLINGUR

Søkt verður eftir HVS Lærlingi til

pf Maria Poulsen

Vit vænta at tú ert raskur/røsk og Fyrikomandi. Koyrikort er Eitt krav.

Ert tú tann rætti persónurin, ert tú vælkomin at senda eina umsókn. Til ap@mp.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 14.02.2011

P/F Maria Poulsen
Smyrilsvegur 8
Postboks 182
FO 110 Tórshavn



Meiri fæst at vita við at ringja til Arthur Poulsen á tlf. 312 000 Ella send ein mail á ap@mp.fo

pf Maria Poulsen

Box 182 · FO-110 Tórshavn

P/F Maria Poulsen er størsta HVS virkið í Føroyum við handli, verkstaði og búnýti. Í dag starvast um 35 fólk í fyritøkuni. Alt innan heilsølu og smásølu.